# BØNARLØTAN

JANUAR 2021 36. árg.

## *Gott nýggjár!* *Gud, lurta eftir bøn míni! Sálmur 55.2*

**1. Nýggjársdagur** **Jóhs. 1.1-28**








*Øssur á veg at vitja á Ríkissjúkrahúsinum.*

**DANMARK, Kristnastova**
**Sólva og Jákup Hansen**
**Susan og Øssur Berghamar**
**Dora og Niels Pauli Nónstein**
**Sigrid 13, Andreas 11, Kristina 9**

Covid-19 farsóttin legði sína køvandi hond á 2020 og gjørdi tað torført at savna fólk til samkomur og tiltøk í Kristnastovu. Í nýggja árinum er inniliga ynski okkara, at vit skjótt aftur kunnu savnast. Vit biðja, at Gud varðveitir okkum og øll tey, vit hava saknað. Biðið serliga fyri útisetunum, at teir halda fast við Harran, Orðið og samfelagið.

## KRINGVARPIÐ

3. jan. Sjónvarpsandakt, Jens Bech
10. jan. Sjónvarpsandakt, Jens Bech
17. jan. Sjónvarpsandakt, Jens Bech

**R7** (meir á www.evr.fo)
Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## *2. Leygardagur* *Jóhs. 1.29-52*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Eg eri takksom fyri tíðina heima og vitjanir í fleiri samkomum. Lívgandi, at tit komu at hoyra, hvat Harrin ger í Tongia. Biðið serliga fyri unga manninum, sum umsetir úr Gamla Testamenti. Eg fari úr Føroyum 4. jan. og til Senegal 14. jan. Biðið, at ongar forðingar verða á vegnum og um varðveitslu. Eg verði væntandi í Dakar nakrar dagar at keypa inn og gera ymiskt neyðugt, áðrenn eg fari út í bygdina.



### SENEGAL, Dakar
### Marion og Hans Arni Jensen
### Ryan 11

Takk, at tit bóðu fyri syni okkara Jens Alan. Ferðaseðilin varð broyttur tríggjar ferðir, og hann var í sóttarhaldi til dagin fyri, at hann kom fram til okkara í øllum góðum. Hann fer aftur til USA 5. jan. Vit vildu fegin vitja í Guinea, men eru hindrað av koronu. Biðið, at vit skjótt sleppa at vitja Guinea.

## *3. Sunnudagur* *Job 1.1-22*




### OM, SUÐURAFRIKA,
### Mamelodi Aids Hope
### Tanja Mortensen

Takk fyri stuðul og forbøn í árinum, sum fór. Biðið, nú nýggja árið byrjar, fyri fyrireikingunum til ymsu tænasturnar, fyri toyminum, og at vit fáa nóg nógv hjálparfólk. Nógvar útskiftingar eru hesa tíðina. Hóast vit ikki kenna 2021, vita vit, at Harrin er trúfastur.

### FILIPSOYGGJAR, Manila
### Liz og Ragnar Niclasen



Vit takka Gudi, at vit kundu halda jól við familju í Onglandi. Korona gjørdi bara, at vit máttu vera enn meiri saman; men tað var jú eisini endamálið! Biðið, at vit sleppa til Kanada í jan. Góð tíðindi úr Kankanaey siga, at møtini og evangelisering eru reglulig. Í lítlu bygdini, vit fyrst búðu í, eru sjey, sum vilja verða doypt.

## *4. Mánadagur* *Job 2.1-13*



### ITALIA, Sant’Elia
### Heidi og Regin Guttesen
### Megan 16, Trisha 8, Emma 4

Hóast ikki er møguligt at hava møtini í salinum sunnudag, tí vit eru ov nógv í tali, halda øll onnur vikutiltøk fram. Vit hava fingið størri dirvi, tí nógv fólk, sum ikki hoyra til samkomuna, fylgja nú trúliga okkara sunnudagsmøtum á netinum.

## 5. Týsdagur — Jóhs. 2.1-25



### USA, Alabama, NTM
### Judy og Óli á Grømma Jacobsen

Í jan. eru fleiri fundir við leiðarar ymsastaðni. 18. jan. tali eg nakrar ferðir á venjingarskúlanum hjá NTM í Missouri. 31. jan. fara vit til Florida at hitta tey, vit arbeiða saman við; ávegis, 31. jan., tali eg í samkomu í Albany í Georgia. Hóast vit ikki kunnu vitja ymisku londini, er altíð nóg mikið at gera hvønn dag. Stóra tøkk fyri forbøn!



### USA, North Carolina
### Charlotte, Calvary Church
### Gudny og John Munro

Takk, at tit bóðu fyri tiltøkunum í samkomuni í des. Vit eru so takksom fyri tey, sum hoyrdu evangeliið, og sum komu til trúgv. Vit eru serliga glað um, at vit enn kunnu møtast regluliga sunnudagar, sjálvt um talið á koronutilburðunum bara veksur, eisini her í býnum.

## 6. Mikudagur — Job 3.1-26



### ZAREPTA

Samkomur og sunnudagsskúlar kunnu framvegis gera dagstúrar sambært tilmælum og í samráð við Zarepta. „Biðið fyri okkum við, at Gud letur okkum upp dyr fyri orðinum...“ Kol. 4.3

## ATLANTIC MISSION

Í jan. heldur nevndin fund og bøn um skránna fyri 2021, bæði viðvíkjandi tiltøkum uttanlands og heima.

## FØROYAR



### Birgit og Svenning av Lofti

Vit eru takksom, at Harrin við bøn hinna heiløgu leiddi okkum ígjøgnum ársins fyrstu torføru mánaðir. Birgit hevur tað gott, og hava vit síðan saman virkað í vitjanar- og evangelisku tænastuni, tó við atliti at koronutilmælunum. Evangelisku tiltøkini í Hólmahúsinum á Eiði í heyst gleddu okkum. Hugsanin er at hava møti har av og á. Gleðiligt, at Leirkerið gav út lívssøguna hjá evangelistinum Moody, sum Svenning týddi. Biðið, at hon verður til andaliga eggjan. Sendingin á Lindini fríggjamorgun kl. 11 „Troystið fólk mítt“ heldur á í jan.

**– Rutt og John í Skemmuni**
**– Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**
**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 13, Svend 12, Terji 8, Petra 7**

## FRANKARÍKI, Nantes, OM



### Cecile og Jóhannis Mortensen
### Sarah 10, Leah Ève 7, Abigail 0

Vit stíla fyri ungdómsarbeiði og ymiskum tænastum í samkomuni. Biðið fyri Frankaríki, tí mong eru stúrin av ógvisligu yvirgangsálopunum og covid-19.

## *8. Fríggjadagur* *Jóhs. 3.1-19*

**FØROYAR**
**Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13**

Jan. og febr. er tíðin, eg brúki mest av orku á alnetinum. Vit hava havt trupulleikar, tí nýggjar reglur á sosialu miðlunum gera, at vit ikki náa út til sama hóp sum áður. Okkum tørvar vísdóm og vegleiðing at handfara støðuna. Biðið fyri familju okkara og heilsuni hjá Adoniu.

**FØROYAR**
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**
**– Khuldah og Sámal Mikkelen,**
**Josva 11, Ester 10, Samuel 6**
★ Í dag fyllir Ragnhild Sharp 17 ár



## *9. Leygardagur* *Jóhs. 3.20-36*



**NTM, FØROYAR**
**Erla og Ingvard Petersen**
**Noomi og Eli Christiansen,**
**Hadassa 10, Tabita 7,**
**Debora 5, Natan 2**

Vit eru takksom, at heimasíða okkara bleiv almenn í des.. Vælkomin at vitja www.ntm.fo. 18. - 22. jan. eru evropeisku leiðslurnar á árligu fundunum, hesaferð á video. Tí verður ikki neyðugt at ferðast. Biðið fyri teimum ungu, sum hugsa um tænastu við NTM í framtíðini, at tey lata seg leiða av Harranum.

## *10. Sunnudagur* *Job 4.1-21*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Miriam 16, Noah 14, Lydia 3**

Vit gleðast um, at dóttir okkara Hannah fer umborð á Logos Hope á Step-programmið í jan. Vit royna at hava umsorgan fyri teimum einstøku, sum hava tilknýti til samkomuna, serliga teimum, ið ikki hava sterkt dagligt trygdarnet.

⋆ Í dag fyllir Joy Tuohy 4 ár

## *11. Mánadagur* *Job 5.1-27*



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Í dag senda vit live-stroyming, men bert monolog. Biðið, at tvívegis samskifti við Zoom kann gerast tøkniliga møguligt. Samskiftið og samarbeiðið við onnur deyv uttanlands er gott. Takk fyri forbøn.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Vit hava saknað samfelag við trúgvandi í koronutíðini, tí so nógv bert hevur verið á alnetinum. Hetta hevur mint okkum á framíhjárættin at savnst frítt til tilbiðjan. Gævi, vit ikki gloyma takksemi, nú vón er fyri, at vit aftur kunnu savnast.

**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

## *12. Týsdagur* *Jóhs. 4.1-26*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Harrin lat ikki dyrnar upp fyri okkum at vera longur í Føroyum, men gjørdi tað møguligt at fara aftur til Cornwall umvegis Noreg. Vit vóna at halda á at skriva sangir saman. Vit tóku fýra sangir upp í Føroyum. Dubby ger læru-podcast til sjónvarp, men hevur framveigs tørv á tøknihjálp.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 14, Rebekah 12, Lydia 10**

## *13. Mikudagur* *Jóhs. 4.27-54*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Vit hava havt nøkur fá evangelisk møti fyri vaksnum í stovuni hjá okkum, men hava bert bjóðað vinum og kenningum. Uppmøtingin hevur verið góð. Nøkur teirra spyrja eftir møtinum. Vit hava svarað, at vit hava einans orku til barna- og ungdómsmøti. Biðið, at Harrin sendir onkran at hjálpa okkum at nøkta henda tørv og at brúka hesar opnu dyr fyri evangeliinum, meðan tær enn eru opnar.



**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

## *14. Hósdagur* — *Præd. 2.1-26*



### GRØNLAND, Nuuk
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen, Kristian 16**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð,**
**Liljan 15, Leanne 14, Luckas 1**

Takkið fyri bønarsvar! Okkum tørvaði størri hølir. Tit bóðu! Tað eydnaðist at keypa skóta-og klubbhúsini, bara 2-3 minuttir til gongu frá samkomu okkara. Av koronu noyðast vit kortini framhaldandi at brúka skúlan. Ætlanin er at byggja nýggju húsini út skjótast gjørligt.



### GRØNLAND, Qasigiannguit
**Solveig og Daniel Kinda**

Vit eru takksom fyri samfelag við tveir ungar menn, sum annars dagliga ganga á miðnámi í øðrum býi. Teir hittast hvørja viku at granska Bíbliuna saman. Annar varð doyptur í heyst, og hin vil fegin verða doyptur í einum ávísum vatni í summar. Biðið, at Harrin styrkir teir í trúnni. Biðið eisini fyri ungari kvinnu, ið tók ímóti Harranum í farna mánaði.

## *15. Fríggjadagur* — *Job 6.1-30*



### DANMARK, Hirtshals, Malta
**Anna og Hans Djurhuus**

Tað eydnaðist okkum at hava føroyskt møti í Aalborg, áðrenn býurin varð avbyrgdur av koronu. Gleðiligt, at nøkur nýggj andlit vóru at síggja. Biðið fyri tænastu okkara. Vit skilja ikki altíð, hvat Harrin vil við øllum avmarkingunum.

## *16. Leygardagur* *Job 7.1-21*



**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**

Takkið fyri konu og dóttir hennara, sum hjálpa við barnaløtunum á Facebooksíðuni hjá Ástjørn. Biðið, at børn og familjur møta til hesar løtur.

**ÍSLAND, Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**
**Akureyri, Sjónarhæð, Ástjørn**

⋆ Í dag fyllir Hadassa Christiansen 10 ár

## *17. Sunnudagur* *Jóhs. 5.1-23*



**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

Gott nýggjár! Vit biðja, at 2021 verður gott ár fyri tykkum øll. Takk fyri forbøn og stuðul. Samfelagið hevur verið stongt trý ymisk tíðarskeið; tað hevur havt stóra ávirkan á samkomulívið. Vit spyrja, hvørjar avmarkingar verða í komandi ári, og nær og hvussu vit kunnu byrja at savnast aftur. Biðið um vísdóm.



**FØROYAR**
**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 13**
**– Unn og Jógvan Zachariassen**
**– Lis Zachariassen**
**– Annika og Poul Færø**
**– Maria og Jens Bech**

## 18. Mánadagur — Jóhs. 5.24-47

**SVEIS, Nyon, Redeemer Grace**
**Jeanette og Solomon Magura**
**Reuben 7, Micah 7**

Samkoman her savnast enn umvegis netið. Tað hevur eftir umstøðunum gingið væl. Samkoman hevur avgjørt at royna at keypa hølir, nú hotellið, har vit hittast, møguliga má lata aftur. Biðið, at vit í trúgv fylgja Harrans leiðslu. Vit søkja eisini eftir leiðara til barnaarbeiðið í samkomuni.

## 19. Týsdagur — Job 8.1-22



**USA, Nebraska,**
**Ethnos 360 (fyrrv. NTM)**
**Rachel og Peter Hansen**

Biðið um vísdóm at hjálpa trúboðarum kring heimin – nú fyri tað mesta gjøgnum t-post ella Zoom. Fyrst í jan. skal Peter til Florida á fund. Tað er fyrsti flogtúrur í næstan eitt ár.

**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen, Louis 3, Timon 1**

Møguleiki er, at vit fáa almennan stuðul at veita fólkinum í Kovol sjúkrahjálp. Biðið, at hetta verður sett í verk skjótt, so vit kunnu brúka orkuna at hjálpa fólkinum í Kovol at skilja Orð Guds og hansara kærleika gjøgnum Jesus Kristus, okkara Harra.

**PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)**
**Carol og Poul Joensen**

## *20. Mikudagur* *Job 9.1-35*

**PAPUA NÝGUINEA, Madang**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 12, Noah 11, Karis 7, Judah 5, Ethan 3**

Biðið, at fólk í samkomuni búnast at fata Guds ætlan og at tæna hvørt øðrum og hinum í nærumhvørvinum. Biðið, at tey ungu gerast sannførd um, at Gud vil brúka tey, at vit í bíbliutímum eggja samkomuni at granska Orð Guds heima, at lesiførleiki og fatan mennist, at vit fáa onkran at heimaskúla okkara trý børn, og at vit fáa samverkafólk at taka lut í samkomubygging og at røkka út til mengen fólkið.

## *21. Hósdagur* *Præd. 3.1-22*



**TURKALAND, Istanbul**
**Annika og Stephen Everett**

Takk fyri trúfesti, bøn og stuðul. Harrin er trúfastur. Her er tekstbrot frá næmingi á bíbliubrævskeiðnum; hann er takksamur, at vit eru í Turkalandi: „Tænasta tykkara hevur positiva, upplýsandi ávirkan á okkara samfelag. Vit undrast á, at tit gera tað uttan gjald!“ Vit fyrireika møguligar túrar eystur í landið og eisini toymisferðir í jan.

## *22. Fríggjadagur* *Jóhs. 6.1-21*



**ONGLAND, Taunton**
**Dorit og Simon Marshall**

Biðið fyri Simon, sum má taka torførar avgerðir um støðuna í Rumenia, nú hann ikki kann ferðast hagar at tosa við viðkomandi fólk. Nógv har eru sjúk av koronu, og tað ávirkar tænastuna. Gott nýggjár við bøn um eitt léttari 2021.

## *23. Leygardagur* *Jóhs. 6.22-44*

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen**

Ein trúgvandi ungur maður úr Buwal, bygdini á Balabac, har vit búðu, byrjaði fyri nøkrum árum síðan eitt nýtt arbeiði í Norðurbalabac. Vit hava ikki møtt fólkinum har norðuri, men tað sær út til, at fleiri eru komin til trúgv, síðan hann flutti hagar. Hann skal nú giftast. Gentan er eisini av Balabac. Vit kenna hana ikki, men skilja, at hon er trúgvandi. Av tí at foreldrini hjá báðum eru muslimar, verður brúdleypið hildið í moskuni.

## *24. Sunnudagur* *Jóhs. 6.45-71*

**TÝSKLAND, Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen, Noah Elias 9**

Biðið fyri mær, Benjamin, at eg fái vísdóm at leiða mína familju at elska Gud meir enn alt annað. Biðið, at sonur okkara Noah skilir gleðiboðskapin.

## *25. Mánadagur* *Job 10.1-22*



**MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca**
**Inga McKendry**

Vit rættlesa Ápostlasøguna til kanning hjá umsetingarráðgeva. Hann eftirkannar nágreiniliga at tryggja, at eingir eyðsýndir feilir eru, ella upplýsingar mangla. Biðið, at Gud gevur okkum vísdóm.

**VENESUELA, Puerto Ordaz**
**Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen**

## *26. Týsdagur* *Job 11.1-20*



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 16, Victoria 14,**
**Emma Grace 13, Jónatan 11,**
**Markus 8, Evita 5, Joy 4**

Hjartans tøkk fyri allan stuðul og hvørja einstaka bøn fyri verkinum í Puruándiro. Vit gleðast um tað, sum Harrin nú ger í og ígjøgnum samkomuna her.

## *27. Mikudagur* *Job 12.1-25*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 15, Hanna 12**

Hanna, yngsta dóttir okkara, og eg, Tim, koyrdu á motorcross í fýra tímar til býin Rizal. Vit fóru á takkarmøti í samkomuni, har vinmaður mín er pastorur. Vit hjálpa regluliga til har at læra fólkið, sum býr nærhendis, og hava eisini vitjað aðrar ættarbólkar. Einastaðni eri eg næstan komin til evangeliið í undirvísing.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Durita Olsen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

## 28. Hósdagur — Præd. 4.1-17



### JAPAN
**Shino og Hallur Mortensen**
**Kano 11, Nana 9, Louie 7, Rio 1**

Vit takka fyri, at samkoman veksur spakuliga. Nú savnast vit vanliga 15 - 17 fólk. Biðið, at vit eru góð vitni, bæði sum samkoma og har, vit búgva.

★ Í dag fylla Adonia Johannesen og Emma Grace Tuohy 13 ár

## 29. Fríggjadagur — Jóhs. 7.1-24



### TEILAND, Chiang Mai, The Well
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 15, Aron 8, Noah Kristian 7**

Í 2020 høvdu trúboðarar nógvar og stórar avbjóðingar. The Well hevur tí samsvarandi havt serstakar avbjóðingar, men samstundis hava vit kent tað sum ein framíhjárætt at stuðla trúboðarum í Asia. Vón okkara er, at vit megna at halda á í 2021.

### PAPUA NÝGUNEA
**Lili og Brian Poulsen,**
**Elliot 4, Jude 2, Evelyn 0**

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

## 30. Leygardagur — Jóhs. 7.25-53

### OM, LOGOS HOPE
**Sámal Rasmussen, Klaksvík**
**Dánial Petur Abrahamsen, Fuglafjørður**

Hannah Berghamar og Noomi Jóhanna Eysturtún eru við Logos Hope á Step-programminum. Logos Hope luttekur við neyðhjálp í Kingstown í St. Vincent og Grenadine í Karibiahavinum til í febr.

★ Í dag fylla Petra í Prestgarði og Tabita Christiansen 7 ár

## 31. Sunnudagur — Job 13.1-28

### BÓKATÆNASTAN
Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

### NÝGGJ BÓK! 360 síður, 240 kr.
Nú fæst kenda bókin *Miracles* eftir C.S. Lewis á fyrsta sinni á donskum. Peter Øhrstrøm, professari, umtalar hana sum „eitt meistaraverk í trúarverju“. Lewis grundgevur mótvegis øllum fordómum fyri opnu, kristnu lívsáskoðanini, sum rúmar Guds skapan og undurvirksemi í tilveruni, hóast gudgivnu náttúrulógirnar framvegis eru galdandi. Hon er eins aktuell í dag sum í 1947, tá hon varð útgivin fyrstu ferð.




Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos